2028
2027
2026
2025
2024
2023
2022
2021
2020
2019
2018
2017

# Á rættari kós 2016

Fíggjarmálaráðið

Búskaparfrágreiðing I

mars 2015

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

# Innihald

**Uppskot til samtyktar um játtanarkarmar á løgtings-fíggjarlógini fyri 2016** **3**

**Inngangur** **7**

**Lýsing av gongdini í búskapinum** **8**

Vísitøl benda á framhaldandi vøkstur 9
Húsarhaldsnýtsla og eftirspurningur 11
Gongdin í fólkatalinum 12
Gongdin í brúkaraprísum 13

Viðskifti við útlond 14

Heimsbúskapurin 15

**Almenn fíggjarmál** **17**

**Uppskotið til játtanarkarmar** **20**

Uppskotið til játtanarkarmar býtt á greinar 21

Rakstrarkarmar fyri § 1 Løgtingið 2016-2020 21

Rakstrarkarmar fyri § 2 Løgmansfyrisitingina 2016-2020 22

Rakstrarkarmar fyri § 3 Fíggjarmál 2016-2020 23

Rakstrarkarmar fyri § 5 Fiskivinnumál 2016-2020 24

Rakstrarkarmar fyri § 6 Vinnumál 2016-2020 25

Rakstrarkarmar fyri § 7 Mentamál 2016-2020 26

Rakstrarkarmar fyri § 11 Heilsumál 2016-2020 28

Rakstrarkarmar fyri § 12 Almannamál 2016-2020 30

Inntøkukarmar fyri § 20 Inntøkur 2016-2020 32

Løguætlan 2016-2024 33

**Fylgiskjal A: Dagførd uppgerð av konjunkturjavnaðum úrsliti fyri almenna geiran** **35**

Kvíggjartún 1 • Box 2039 • FO-165 Argir
☏ (+298) 35 20 20 • 🖷 (+298) 35 20 25 • 🖂 fmr@fmr.fo • www.fmr.fo

**Løgtingið** **Argir**, 27. mars 2015

**Løgtingsmál nr. 141/2014: Uppskot til samtyktar um játtanarkarmar á løgtings-fíggjarlógini fyri 2016**

**Uppskot**

**til**

**samtyktar um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2016**

Við hesi løgtingssamtykt tekur Løgtingið undir við, at samlaði útreiðslukarmurin á løgtings-fíggjarlógini fyri 2016 verður 4.642,4 mió. kr. Rakstrarkarmurin verður 4.369,4 mió. kr., og løgukarmurin verður 273,0 mió. kr. Samlaði inntøkukarmurin verður 4.698,4 mió. kr. RLÚ úrslitið á løgtingsfíggjarlógini fyri 2016 verður 56 mió. kr. Í talvuni niðanfyri eru samlaðu játtanarkarmarnir fyri 2016 býttir á greinar.

**Játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2016**

| *Mió. kr.* | **Rakstur** | **Løgur** |
|---|---|---|
| § 1 Løgtingið | 48,3 | 0,0 |
| § 2 Løgmansfyrisitingin | 56,1 | 2,0 |
| § 3 Fíggjarmál | 344,3 | 104,5 |
| § 5 Fiskivinnumál | 169,7 | 0,0 |
| § 6 Vinnumál | 315,8 | 17,0 |
| § 7 Mentamál | 1.001,3 | 109,5 |
| § 11 Heilsumál | 984,9 | 34,0 |
| § 12 Almannamál | 1.449,0 | 6,0 |
| ***Útreiðslur tilsamans*** | **4.369,4** | **273,0** |
| **Útreiðslukarmur** | **4.642,4** | |
| **Inntøkukarmur § 20** | **4.698,4** | |
| **RLÚ-úrslit** | **56,0** | |

Løgtingið verður gjørt varugt við, at til tess at røkka ætlaða úrslitinum á løgtingsfíggjarlógini fyri 2016 er grundarlagið tær givnu fortreytirnar fyri framskrivingum og tey neyðugu tiltøkini á útreiðslu- og inntøkusíðu landskassans, soleiðis sum tað er lýst í viðmerkingunum og hjáløgdu Búskaparfrágreiðing I.

**Viðmerkingar**

Í samgonguskjalinum frá november 2011 stendur: "Samgongan hevur sett sær fyri at fáa yvirskot á fíggjarlógina í seinasta lagi 2016."

Avbjóðingarnar, sum landsstýrið tók á seg í november 2011, vóru nógvar og stórar. Skattatrýstið á lønarinntøku var køvandi, undirskot í landskassanum, høgt arbeiðsloysi og fólkafráflyting.

Málið hjá samgonguni var, at tað skuldi loysa seg at arbeiða, og ein varin og miðvísur fíggjarpolitikkur skuldi rekast, soleiðis at framtíðar ættarlið eisini eru tryggjað vælferð. Fortreytin fyri einum góðum samfelag fyri øll, er búskaparvøkstur, ið tryggjar vælferðina.

Fíggjarlógirnar frá 2012 til 2014 hava havt ein varnan vøkstur í útreiðslunum. Við at tálma vøkstrinum í útreiðslunum skuldu inntøkurnar fáa útreiðslurnar aftur.

Hyggja vit eftir útreiðslum og inntøkum árini 2011-2014, síggja vit, at

- Inntøkurnar eru vaksnar við 471,6 mió. kr., ella 3,6% um árið
- Útreiðslurnar eru vaksnar við 181,3 mió. kr., ella 1,4% um árið
- Inntøkurnar í tíðarskeiðnum eru vaksnar 2,6 ferðir so skjótt sum útreiðslurnar

Vit hava framt tillagingar uttan at fremja stórar skerjingar í vælferðini. Landsstýrið hevur í staðin lagt dent á at fremja nýskipanir og spakuliga tillaga raksturin til eitt støði, sum er haldført, uttan at tann grundleggjandi vælferðin kom í vanda.

Hetta uppskot hevur eitt avlop (RLÚ) á 56 mió. kr. í 2016, og næstu 5 árini er samlaða avlopið yvir hálva milliard, og landið kann fara undir at rinda skuld aftur.

Í hesum kørmum mæla vit til at raðfesta vælferðarøkini. Tilsamans vaksa útreiðslurnar 0,9%. Til bleytu økini, sum eru skúla-, heilsu- og almannamál, vaksa útreiðslurnar 1,6%. Inntøkurnar vaksa 2,8% við vanligum framskrivingum, og við ætlaðum nýggjum inntøkutiltøkum vaksa inntøkurnar 4,9%.

Nakað er eftir á mál at fáa haldføri í landskassan, hóast avlop er í hesum uppskoti til játtanarkarmar. Almenni geirin hevur eitt bygnaðarligt hall, og hetta hallið økist við væntaðu broytingunum í fólkasamansetingini. Hetta uppskot til játtanarkarmar fer at minka um bygnaðarliga hallið, sum almenni geirin hevur. Tað er ein fortreyt fyri, at fólk framhaldandi kann støðast í Føroyum.

Fíggjarpolitisku átøkini mugu ávirka bæði tænastur, veitingar til borgarar og tryggja varandi nýggjar inntøkur til landskassan, soleiðis at eisini tað bygnaðarliga hallið verður burtur. Gera vit ikki tað, fáa vit ikki ført sjálvstøðugan fíggjarpolitikk í framtíðini, tí skuldin gerst ov stór. Samgongan metir tað ikki at vera rætt at senda hesa rokning víðari til komandi ættarlið. Neyðugt er at halda fast við verandi fíggjarpolitikk næstu árini fyri at tryggja haldføri landskassans.

Hyggja vit eftir nøkrum búskaparligum lyklatølum árini 2011-2014, síggja vit, at

- Løntakaratalið er vaksið við um leið 1000 fólkum
- Arbeiðsloysið er lækkað úr 7% niður í 3,2%
- Nettofráflytingin er broytt til nettotilflyting
- Fólkatalið er vaksið við 440 fólkum

Tað gongur væl. Men neyðugt er framhaldandi at reka ein varnan fíggjarpolitikk.

## Fortreytir

Høvuðsfortreytin fyri uppskotinum til játtanarkarmar 2016-2020 er ásetingin í samgonguskjalinum, um at avlop skal vera á fíggjarlógini í seinasta lagi í 2016.

### Fortreytir fyri framrokning av útreiðslum 2016-2020

Framskrivingar av lógarbundnum játtanum og bundnum raðfestingum eru gjørdar fyri árini 2016 til 2020.

Framrokningarnar eru í høvuðsheitum grundaðar á fólkatal og fólkasamanseting, til dømis metta talinum á skúlanæmingum og pensjónistum 2016-2020. Í framrokningunum er lagt upp fyri bundnum raðfestingum næstu árini, til dømis at nýggir stovnar verða tiknir í nýtslu. Í játtanarkørmunum er framskrivað í ársins prísum í 2016, men árini 2017-2020 verður framskrivað í føstum prísum. Lønarútreiðslurnar í 2016 eru samsvarandi verandi sáttmálum.

Játtanarkarmarnir eru gjørdir við verandi rentustøði. Hetta er ein óvissa í játtanarkørmunum, tí at rentustøðið kann broytast, og harvið kunnu útreiðslur landskassans til rentustuðul og rentuútreiðslur av skuldini eisini broytast.

Løgurnar fyri 2016-2020 eru gjørdar samsvarandi langtíðarløguætlanini. Sambært langtíðarløguætlanini verða løgur fyri útvið 300 mió. kr. árliga næstu árini.

### Fortreytir fyri framrokning av inntøkum 2016-2020

Inntøkurnar í uppskotinum til játtanarkarmar fyri árini 2016-2020 eru framroknaðar við støði í søguligum inntøkutølum og teimum fortreytum, sum eru kendar í løtuni. Í játtanarkørmunum eru inntøkurnar framskrivaðar í ársins prísum í 2016, men árini 2017-2020 verður framskrivað í føstum prísum.

Framskrivingarnar eru gjørdar sambært metingum um útlit fyri gongdina í búskapinum. Forsagnir frá millumtjóða stovnum og Búskaparráðnum eru brúktar sum partur av grundarlagnum undir metingunum.

Sum vant, verða inntøkurnar framroknaðar varisliga. Royndirnar síðstu árini eru, at tað er torført at meta um inntøkurnar hjá landskassanum og tær broytingar, sum kunnu koma fyri av ymiskum tiltøkum, skatta- og avgjaldsbroytingum og øðrum.

Í fortreytunum fyri inntøkunum verður BTÚ í ársins prísum mett at vaksa um 3% í 2016. Á teimum skatta- og inntøkujáttanum, har hetta verður hildið vera neyðugt, eru gjørdar serstakar metingar út frá fortreytunum fyri játtanina.

### Uppskotið til játtanarkarmar 2016-2020

Uppskotið til játtanarkarmar byggir á fíggjarlógina fyri 2015, umframt politiskar semjur og avtalur gjørdar síðani.

Í talvuni niðanfyri er uppskotið til játtanarkarmar fyri árini 2016 til 2020 útgreinað.

Samgongan er samd um bæði at hækka inntøkurnar og at lækka vøksturin í útreiðslunum hjá landskassanum næstu árini fyri at fáa avlop á fíggjarlógina fyri 2016 og árini frameftir.

Talvan niðanfyri vísir uppskotið til løgtingssamtykt um játtanarkarmar býtt á greinar og ár.

| Talva: Útgreinaðir játtanarkarmar fyri 2016-2020 | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| *Mió. kr.* | **2016** | **2017** | **2018** | **2019** | **2020** |
| Rakstrarútreiðslur, §1-§12: | | | | | |
| §1 Løgtingið | 48,3 | 46,3 | 46,3 | 46,3 | 46,3 |
| §2 Løgmansfyrisitingin | 56,1 | 54,8 | 54,8 | 55,3 | 55,3 |
| §3 Fíggjarmál | 344,3 | 347,2 | 353,6 | 359,5 | 365,3 |
| §5 Fiskivinnumál | 169,7 | 169,7 | 169,7 | 169,7 | 169,7 |
| §6 Vinnumál | 315,8 | 316,0 | 316,0 | 316,0 | 316,0 |
| §7 Mentamál | 1.001,3 | 1.004,9 | 1.008,4 | 1.012,2 | 1.015,5 |
| §11 Heilsumál | 984,9 | 992,7 | 1.000,7 | 1.008,7 | 1.016,7 |
| §12 Almannamál | 1.449,0 | 1.453,7 | 1.475,6 | 1.495,1 | 1.516,7 |
| **Rakstrarútreiðslur tilsamans** | **4.369,4** | **4.385,3** | **4.425,1** | **4.462,8** | **4.501,5** |
| **Løguútreiðslur, §1-§12** | **273,0** | **280,9** | **285,0** | **285,0** | **285,0** |
| **Rentuútreiðslur, netto** | **77,0** | **73,0** | **69,0** | **69,0** | **69,0** |
| **Inntøkur** | **4.775,4** | **4.837,4** | **4.887,4** | **4.937,4** | **4.987,4** |
| **RLÚ-úrslit** | **56,0** | **98,2** | **108,3** | **120,6** | **131,9** |

**Skjal hjálagt:**

Skjal 1: Búskaparfrágreiðing I

Fíggjarmálaráðið, 27. mars 2015

**Jørgen Niclasen**
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

# Inngangur

Sambært §8 í løgtingslóg nr. 42 frá 4. mai 2009 um landsins játtanarskipan skal frágreiðing (Búskaparfrágreiðing I), sum lýsir og metir um búskaparstøðu Føroya, harímillum tann almenna geiran, verða løgd við uppskotinum til løgtingssamtykt um játtanarkarmar. Uppskotið til løgtingssamtykt um játtanarkarmar fyri fíggjarlógina næsta ár skal leggjast fram fyri 1. apríl.

Uppskotið til játtanarkarmar er gjørt við støði í samgonguskjalinum, har ið samgongan hevur sett sær málið at fáa avlop á fíggjarlógina í seinasta lagi í 2016. Uppskotið til løgtingssamtykt um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2016 er í høvuðsheitum grundað á samtyktu løgtingsfíggjarlóg fyri 2015 (løgtingsmál nr. 10/2014). Nýggjar framrokningar eru gjørdar av inntøkum og útreiðslum, umframt at umraðfest er á summum økjum.

Frágreiðingin er sett soleiðis saman, at fyrst er stutt lýsing av gongdini í føroyska búskapinum, av gongdini í altjóða búskapinum og av almenna búskapinum. Síðani verður greitt frá uppskotinum til játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2016. Fortreytirnar fyri játtanarkørmunum verða eisini lýstar, umframt at framrokningar og ætlað tiltøk árini 2016 til 2020 verða lýst. Langtíðarløguætlanin fyri árini 2016-2024 verður eisini lýst.

## Lýsing av gongdini í búskapinum

Vøkstur og framgongd hava verið í føroyska búskapinum síðani miðskeiðis í 2013. Hetta sæst serliga á lønargjaldingunum, sum byrjaðu at vaksa av álvara miðskeiðis í 2013. Harafturat er talið á løntakarum hækkað og arbeiðsloysið er lækkað. Arbeiðsloysið er lækkað úr umleið 2.000 við ársbyrjan 2011 til umleið 900 í februar 2015. Inntøkurnar hjá landskassanum frá meirvirðisgjaldi, benda eisini á, at privata nýtslan er hækkað frá miðskeiðis í 2013.

Mynd 1 niðanfyri vísir gongdina í bruttotjóðarúrtøku fyri árini 1998-2013 og metingar fyri árini 2014-2016. Samanumtikið metir Fíggjarmálaráðið, at føroyski búskapurin, BTÚ, vaks umleið 5% í 2014, og vøksturin verður mettur til umleið 3% í 2015 og 2016 (tølini eru í ársins prísum).

**Mynd 1**

**Bruttotjóðarúrtøka í ársins prísum og árlig broyting í %, 1998-2016**




* Tølini fyri 2014 til 2016 eru metingar og skulu lesast við fyrivarni.
Kelda: Hagstovan og forsagnir frá Fíggjarmálaráðnum og Búskaparráðnum.

Í 2008 og 2009 var afturgongd í føroyska búskapurin, sum eisini rakti allan Vesturheimin og okkara grannalond. Afturgongdin kom serliga av ógvusligari minking í íløgum og húsarhaldsnýtslu og vegna kreppu í bankakervinum í Vesturheiminum, sum ávirkaði atgongdina til fígging. Árini 2010 og í 2013 var stórur vøkstur í bruttotjóðarúrtøkuni (BTÚ). Vøksturin í 2010 kom serliga av uppsjóvarvinnuni vegna størri føroyska makrelkvotu, meðan vøksturin í 2013 í stóran mun kom av høgum prísum og størri nøgdum av útfluttum alifiski.

Framgongdin, sum byrjaði í 2013 helt áfram í 2014. At døma eftir lønargjaldingum tíðarskeiðið mars 2014 til februar 2015, er framvegis stórur vøkstur í lønargjaldingum, sí mynd 2 og mynd 4, sum vísir lønargjaldingar býttar á mánaðir. Arbeiðsloysið er í løtuni sera lágt og lækkar ikki eins skjótt og áður. Tá ið arbeiðsloysið er so lágt - umleið 3,2% - kann ikki roknast við, at arbeiðsloysið fer at lækka eins skjótt og áður.

Metingarnar hjá Fíggjarmálaráðnum samsvara við metingar hjá Búskaparráðnum fyri næstu árini. Størstu orsakirnar til, at metingarnar um búskaparvøkstur árini 2015 og 2016 eru lækkaðar nakað sammett við 2014, eru:

- at heimsbúskapurin sum heild er viknaður síðsta hálva árið. Serliga í Evropa, Russlandi og Kina eru búskapirnir viknaðir
- at størri óvissa er um gongdina í okkara størstu útflutningsvinnum. Serliga tað at strandarlondini eru ikki samd um býtið av heildarkvotunum av norðhavssild og svartkjafti, og óvist er, hvørjar semjur londini gera

- at roknast kann við heldur færri íløgum í 2015 og 2016 sammett við í 2014
- at roknast kann við, at fíggjarpolitikkurin hjá landinum verður táttaður nakað, so hvørt sum roynt verður at minka hallið í landskassanum

Mynd 2

Lønargjaldingar í mió. kr., býtt á ársfjórðingar, 1. ársfjórðingur 1985 til 4. ársfjórðing 2014




Kelda: Hagstovan.

At vøksturin hæsar nakað av nú, er ikki óvæntað. Óvanliga nógv íløguvirksemi var í 2014, sum hevur stimbrað búskapin. Sannlíkt verða nógvar íløgur gjørdar í 2015, men helst heldur færri íløgur sammett við 2014.

Síðsta hálva árið eru búskapirnir í Evropa, Russlandi og Kina viknaðir. Bæði Evropa og Russland eru millum okkara týðandi útflutningsmarknaðir, og búskaparstøðan á hesum marknaðum kann ávirka útflutningin á hesar marknaðir, hóast tekin ikki eru um hetta enn. Millumtjóða stovnar, til dømis IMF, OECD og aðrir rokna somuleiðis við minni vøkstri í heimsbúskapinum, fyrst og fremst orsakað av, at búskapirnir í Evropa, Russlandi, Kina og Japan eru viknaðir.

Hinvegin eru eisini umstøður, sum tala fyri hægri vøkstri enn væntað. Til dømis er oljuprísurin lækkaður, umframt at rentustøðið er hildið áfram at lækka. Lægri oljuprísir og lægri rentustøði fara í sjálvum sær at stimbra búskapin, men hildið verður kortini, at ein veikari heimsbúskapur, færri íløgur og tað at roknast kann við tiltøkum at minka hallið hjá landinum fáa størri ávirkan á búskapin.

## Vísitøl benda á framhaldandi vøkstur

Tekin eru um, at eftirspurningurin frá húsarhaldum og fyritøkum er vaksandi. Hetta sæst aftur í inntøkum hjá landinum frá meirvirðisgjaldinum og í innflutninginum. Harafturat benda nýggju umsetningshagtølini frá Hagstovuni á, at húsarhaldsnýtslan veksur spakuliga. Í konjunkturkanningini, sum Fíggjarmálaráðið gjørdi í januar í ár, svaraðu flestu fyritøkur í handils- og tænastuvinnuni eisini, at tær merkja framgongd í søluni og at tær rokna við vaksandi eftirspurningi.

Gongdin er framvegis vánalig í heimligu fiskivinnuni, og roknast kann við, at ískoytið til búskaparvøksturin frá hesi vinnuni og atknýttu fiskavirkisvinnuni á landi verður avmarkað næstu árini. Møguleiki er tó fyri stórum vøkstri í hesum vinnum, sum frálíður, um botnfiskastovnarnir koma fyri seg aftur, og fiskiskapurin batnar.

Roknast kann við ískoyti til vøksturin frá nýggju fiskavirkjunum, sum virka uppsjóvarfisk á landi. Alivinnan gav sera stórt ískoyti til vøksturin í BTÚ í 2013 og sannlíkt eisini í 2014. Hetta var serliga vegna høgar prísir og størri nøgdir av útfluttum alifiski. Roknast kann eisini við ískoyti til vøkstur frá alivinnuni frameftir, men sannlíkt verður ískoytið ikki eins stórt og í 2013 og 2014.

*Gongdin á arbeiðsmarknaðinum*

Arbeiðsloysið er hildið áfram at lækka síðsta árið og var umleið 900 fólk í februar 2015, sum svarar til 3,2% av arbeiðsfjøldini. Arbeiðsloysið er annars lækkað úr umleið 2.000 fólk, tá ið arbeiðsloysið var hægst við ársbyrjan 2011, sum svaraði til 7,5% av arbeiðsfjøldini, sí mynd 3.

Mynd 3

Árstíðarjavnaðir løntakarar (hava A-inntøku) í tali og árstíðarjavnað arbeiðsloysi í %, jan-1985 til feb-2015




Kelda: Hagstovan.

Gongdin í lønargjaldingum býtt á vinnugreinar er víst í talvu 1. Samanumtikið vuksu lønargjaldingarnar 5,7% í 2014. Framvegis er árligur vøkstur í lønargjaldingum á omanfyri 5%. Serliga lønargjaldingar innan fiskivinnu, alivinnu og kryvjivirki og bygging vuksu í 2014, men eisini í privatum tænastuvinnum vuksu lønirnar umleið 5% í 2014.

Talva 1. Lønir í høvuðsvinnugreinum, 2011-2014, mió. kr.

| *Vinnugrein* | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | Munur 2013-14 | Munur í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fiski-, ali- o.o. ráevnisvinna | 1.286 | 1.357 | 1.361 | 1.487 | 125 | 9,2 |
| Byggivinna o.o. tilvirking | 827 | 839 | 842 | 947 | 105 | 12,4 |
| Privatar tænastuvinnur | 2.216 | 2.328 | 2.367 | 2.485 | 118 | 5,0 |
| Almenn o.o. tænasta | 2.524 | 2.561 | 2.620 | 2.683 | 63 | 2,4 |
| **Lønargjaldingar tilsamans** | **6.852** | **7.084** | **7.191** | **7.603** | **412** | **5,7** |

*Kelda: Hagstovan.*

Talið á løntakarum (tað er fólk, sum hava A-inntøku) er vaksið síðani 2011, tá ið tað vóru umleið 23.300 løntakarar, til umleið 24.300 í 2014. Talið á løntakarum var annars hægst í 2007, tá ið útvið 26.000 løntakarar vóru í Føroyum. Mynd 3 vísir gongdina í arbeiðsloysinum og í talinum á løntakarum. Løntakarar býttir á vinnugreinar eru eisini vístir í talvu 2.

**Talva 2. Løntakarar í høvuðsvinnubólkum, 2010-2014, fólk í tali**

| *Vinnubólkur* | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | Munur 2013-14 | Munur í % |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fiski-, ali- o.o. ráevnisvinna | 4.184 | 3.668 | 4.009 | 3.869 | 4.122 | 253 | 6,5 |
| Byggivinna o.o. tilvirking | 3.048 | 2.999 | 2.919 | 3.018 | 3.197 | 179 | 5,9 |
| Privatar tænastuvinnur | 7.921 | 7.735 | 7.844 | 7.935 | 8.078 | 143 | 1,8 |
| Almenn o.o. tænasta | 8.782 | 8.857 | 8.914 | 8.761 | 8.853 | 92 | 1,1 |
| **Løntakarar tilsamans** | **23.935** | **23.259** | **23.686** | **23.583** | **24.250** | **667** | **2,8** |

*Kelda: Hagstovan.*

## *Húsarhaldsnýtsla og eftirspurningur*

Innflutningurin av drúgvum og hálvdrúgvum vørum er framvegis vaksandi, men vøksturin er hæsaður nakað av um ársskiftið 2014/15, sí mynd 4. At innflutningurin veksur er tekin um vaksandi eftirspurning. Sambært seinastu konjunkturkanning eru føroysk húsarhald framvegis bjartskygd um framtíðina og rokna við betri fíggjarstøðu og lægri ella óbroyttum arbeiðsloysi næsta hálva árið.

**Mynd 4**

**Innflutningur av ódrúgvum, drúgvum og hálvdrúgvum nýtsluvørum og útgoldnar lønir, jan-1998 til feb-2015**




Kelda: Hagstovan.

Nýggjasta uppgerðin av konjunkturvísitalinum (treystitalinum) hjá Fíggjarmálaráðnum vísir, at føroysk húsarhald framvegis eru bjartskygd um framtíðina, tó at vísitalið er lækkað nakað samanlagt, sí mynd 5. At samlaða vísitalið lækkar kemur av, at vísitalið lækkar fyri tvær stórar vinnur, tilfeingisvinnurnar og tænastuvinnurnar. Kanningin varð gjørd í januar mánaði í ár, og samlaða vísitalið lækkaði úr 37 til 18.

Mynd 5

Konjunkturvísital fyri húsarhald og vinnu tilsamans




Kelda: Fíggjarmálaráðið.

*Gongdin í fólkatalinum*

Síðstu uppgerðir av fólkatalinum vísa, at í 2014 var nettotilflyting til landið á útvið 300 fólk. Hetta er fyrstu ferð síðani 2008, at nettotilflyting er til landið, sí myndirnar 6 og 7. Høvuðsorsøkin er, at færri fólk flyta, men tilflytingin er eisini vaksin nakað. Fráflytingin vaks annars nógv eftir fíggjarkreppuna, og serliga árini 2010 til 2012 var stór nettofráflyting. Fráflytingin fór hinvegin at minka miðskeiðis í 2012, og er minkað støðugt líka síðani.

Søguliga hevur nettofráflytingin, sveiggjað nógv alt eftir, hvussu tíðirnar hava verið í Føroyum og eftir umstøðunum á arbeiðsmarknaðinum. Frameftir kann somuleiðis roknast við, at fólkafráflytingin fer at sveiggja nógv. Hóast nettofráflytingin er minkað nógv í 2013 og er vend til nettotilflyting í 2014, benda allar framrokningar á, at fólkasamansetingin fer at broytast frameftir, soleiðis at lutfalsliga færri fólk vera í arbeiðsførum aldri. Hetta fer at gera tað torførari at fáa almennar inntøkur og útreiðslur at javnviga yvir longri áramál.

Mynd 6

Fólk flutt til og úr Føroyum, jan-2007 til des-2014




Kelda: Hagstovan.

Tí er umráðandi, at tiltøk framhaldandi verða sett í verk næstu árini, sum betra um livi- og arbeiðsumstøður og útbúgvingarmøguleikar í Føroyum og harvið kunnu viðvirka til, at fólkafráflytingin framhaldandi minkar. Mynd 7 vísir broytingar í fólkatalinum síðani 1970 býtt á ár.

Mynd 7

Broytingar í fólkatalinum, 1970 til 2014




Kelda: Hagstovan.

Í fleiri ár hevur gongdin í fólkatalinum verið, at fólkatalið er vaksið mest í miðøkinum. Henda gongdin hevur tikið dik á seg eftir fíggjarkreppuna. Sama gongd sæst í øðrum londum í Vesturheiminum. Talva 3 vísir gongdina síðsta árið í fólkatalinum býtt á øki í landinum. Talvan vísir, at mestsum allur fólkavøksturin í landinum er í miðøkinum kring Tórshavn og í Eysturoynni.

Ávísar bygdir eru sjálvsagt uttanfyri miðøkið, har ið fólkatalið eisini vekur, men høvuðsgongdin er, at fólkatalið mestsum bara veksur í miðøkinum. Roknast kann við, at gongdin við at fólk flytur til miðøkið úr útjaðaranum fer at halda fram næstu árini. Alt bendir á, at tað, sum frálíður, verður torførari hjá útjaðaraøkjum at standa seg í kappingini móti miðøkinum.

Talva 3. Fólkatalið býtt á øki í landinum, 1. jan. 2013 til 31. des. 2014

| *Øki í landinum* | Fólkatal 1. jan. 2013 | Burðaravlop | Nettoflyting | Fólkatal 1. des. 2014 | Broyting í tali | Broyting í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Norðuroyggjar | 5.853 | 16 | -7 | 5.862 | 9 | 0,2 |
| Eysturoy | 10.571 | 68 | 146 | 10.785 | 214 | 2,0 |
| Tórshavnar økið* | 18.252 | 135 | 145 | 18.532 | 280 | 1,5 |
| Streymoyggin annars | 4.510 | 16 | 12 | 4.538 | 28 | 0,6 |
| Vágoy | 3.056 | 10 | 16 | 3.082 | 26 | 0,9 |
| Sandoy | 1.276 | -2 | 0 | 1.274 | -2 | -0,2 |
| Suðuroy | 4.666 | 3 | -18 | 4.651 | -15 | -0,3 |
| **Alt landið** | **48.184** | **246** | **294** | **48.724** | **540** | **1,1** |

*Tórshavn, Hoyvík og Argir.

*Kelda: Hagstovan.*

## *Gongdin í brúkaraprísum*

Brúkaraprísir hava verið at kalla støðugir ella eru lækkaðir nakað síðani 2011, sí mynd 8. Orsøkirnar eru fleiri, millum aðrar kunnu nevnast lágur eftirspurningur, herd kapping á fleiri marknaðum, lægri rentur og lægri oljuprísir. Ein orsøk, sum sæst beinleiðis í brúkaraprístalinum, er at peningastovnar hava lækkað renturnar munandi. Lækkingin kemur í stóran mun av herdari kapping millum peningastovnarnir og av lægri rentustigi á fíggjarmarknaðum. Harafturat eru

oljuprísir lækkaðir munandi, sum sæst aftur í fleiri vørubólkum, t.d. flutningskostnaðir og á kostnaðinum á matvørum.

Mynd 8

Brúkaraprístalið, 2001 til 2014, býtt á ársfjórðingar, indeks 2001 = 100




Kelda: Hagstovan.

## Viðskifti við útlond

Avlop var á føroyska handilsjavnanum í 2014 á umleið 400 mió. kr., meðan hall var í 2013 á útvið 200 mió. kr. Handilsjavnin fevnir bara um handil við vørum við útlond; sostatt verða tænastuveitingar til og frá útlondum ikki taldar við í handilsjavnan. Tænastuveitingar eru hinvegin taldar við í *vøru- og tænastujavnan*.

Handilsjavnin sveiggjar nógv alt eftir privatari nýtslu, íløgum í vinnulívinum, oljuprísum og útflutninginum av fiski og alifiski. Eins og sæst í mynd 9 niðanfyri, er føroyski útflutningurin vaksin sera nógv síðstu árini úr 4,1 mia. kr. í 2009 til 6,3 mia. kr. í 2014, ella ein vøkstur á umleið 54% eftir fimm árum.

Mynd 9

Innflutningur og útflutningur, mió. kr., 1988 til 2014




Viðm.: Handilsjavnin fevnir bara um vørur; tænastur eru sostatt ikki við.

Kelda: Hagstovan.

Uppgerðir av gjaldsjavnanum eru tøkar fram til 2012. Við tað at handilsjavnin er størsti parturin og tann parturin av gjaldsjavnanum, sum broytist mest frá ári til ár, ber til leysliga at meta um gjaldsjavnan fyri 2013 og 2014. Grundað á handilsjavnan, var helst avlop á gjaldsjavnanum á 500-

700 mió. kr. í 2013 og 1,1-1,3 mia. kr. í 2014. Gjaldsjavnin fram til 2012 og metingar fyri 2013 og 2014 eru vístar í mynd 10 niðanfyri.

**Mynd 10**

**Rakstrarviðskifti gjaldsjavnans í mió. kr., 1998-2014**




* Tølini fyri 2013 og 2014 eru metingar og skulu lesast við fyrivarni.
Kelda: Hagstovan.

## Heimsbúskapurin

Heimsbúskapurin er viknaður síðsta hálva árið ella so, og roknast kann við minni vøkstri sammett við áður. Serliga í Evropa, Russlandi, Japan og Kina eru búskapirnir viknaðir. Orsøkirnar eru helst fleiri. Millum aðrar kunnu nevnast, at fáar íløgur verða gjørdar og at arbeiðsmegin ikki veksur eins nógv og áður. Eftirspurningurin í flestu londum í Vesturheiminum er framvegis lágur. Roknast kann við, at búskaparvøksturin í Vesturheiminum næstu árini verður darvaður av, at fáar íløgur verða gjørdar og av lágari húsarhaldsnýtslu.

Vøksturin í menningarlondum er í løtuni um 4% um árið, í USA um 3% um árið, og í Evropa er vøkstur á umleið 1% um árið, sí talvu 4 niðanfyri. Oljuprísir eru lækkaðir munandi síðsta árið ella so. Príslækkingarnar á olju koma helst bæði av stórum útboði á marknaðum og av at útlitini fyri høgum búskaparvøkstri eru vánalig næstu árini.

**Talva 4. Árligur vøkstur í BTÚ í føstum prísum 2012-2016 býtt á øki**

| *% um árið í føstum prísum* | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|
| USA | 2,3 | 2,2 | 2,4 | 3,6 | 3,3 |
| Evruøkið | -0,7 | -0,5 | 0,8 | 1,2 | 1,4 |
| Stóra Bretland | 0,3 | 1,7 | 2,6 | 2,7 | 2,4 |
| Ídnaðarlond | 1,2 | 1,3 | 1,8 | 2,4 | 2,4 |
| Menningarlond | 5,1 | 4,7 | 4,4 | 4,3 | 4,7 |
| Heimsbúskapurin | 3,4 | 3,3 | 3,3 | 3,5 | 3,7 |

*Kelda: IMF World Economic Outlook Update, 20. januar 2015.*
*Viðm.: Tølini fyri 2015 og 2016 eru metingar.*

At oljuprísir eru lækkaðir kann sjálvsagt hava við sær, at vøksturin verður nakað hægri enn væntað. Hinvegin eru eisini umstøður, sum sannlíkt fara at darva vøkstrinum og sum roknast kunnu við fáa størri ávirkan enn lágir oljuprísir.

Búskaparstøðan er framvegis ymisk í Norðurevropa og Suðurevropa. Arbeiðsloysið í Suðurevropa er úr umleið 10% í Fraklandi til umleið 25% í Grikkalandi. Í Norðurevropa er arbeiðsloysi lægri. Úr umleið 5% í Týsklandi, til umleið 8% í Svøríki. Arbeiðsloysið millum ung er sera høgt í Suðurevropa, umleið 50% í Spania og Grikkalandi. Roknast kann við, at høga arbeiðsloysið í Suðurevropa verður eitt varandi fyribrigdi næstu árini, av tí at búskaparvøksturin í løtuni er ov lágur til at nógv nýggj arbeiðspláss taka seg upp. Talva 5 niðanfyri vísir arbeiðsloysi í % av arbeiðsfjøld býtt á útvald lond.

**Talva 5. Arbeiðsloysi í % av arbeiðsfjøld, býtt á lond**

| *Arbeiðsloysi í %* | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Føroyar | 1,6 | 1,3 | 3,9 | 5,8 | 7,0 | 5,6 | 4,5 | 3,8 | *3,2* |
| Danmark | 3,8 | 3,5 | 6,0 | 7,5 | 7,6 | 7,5 | 7,0 | 6,9 | *6,6* |
| Ísland | 1,0 | 1,7 | 8,0 | 8,1 | 7,4 | 5,8 | 4,4 | 4,0 | *3,5* |
| Noreg | 2,5 | 2,6 | 3,2 | 3,6 | 3,3 | 3,2 | 3,5 | 3,7 | *3,8* |
| Stóra Bretland | 5,4 | 5,7 | 7,7 | 7,9 | 8,1 | 8,0 | 7,6 | 6,4 | *5,8* |
| USA | 4,6 | 5,8 | 9,3 | 9,6 | 8,9 | 8,1 | 7,4 | 6,3 | *6,0* |
| Evruøkið | 7,5 | 7,6 | 9,6 | 10,1 | 10,1 | 11,3 | 11,9 | 11,6 | *11,2* |

*Kelda: Hagstovan og IMF. Tølini fyri 2015 eru metingar.*

Heimsbúskapurin er framvegis stimbraður av søguliga lágum rentum, lagaligum fíggjarumstøðum og stuðulstiltøkum frá miðbankum. Harafturat fer fíggjarpolitikkurin í flestu londum í vesturheiminum í 2015 væntandi at virka heldur minni tálmandi sammett við 2014 og árini frammanundan. Í løtuni er líkt til, at rentustøðið verður verandi óvanliga lágt, í øllum førum næstu 1-2 árini.

Enn er ikki greitt, hvørja ávirkan tað fær á heimsbúskapin og á altjóða fíggjarmarknaðir, tá ið miðbankar stigvíst byrja at minka um tey nógvu og óvanligu stuðulstiltøkini, sum eru sett í verk síðstu árini. Stuðulstiltøkini hava einki søguligt fordømi, og tað er framvegis ógreitt, eftir hvørji tíðarætlan stuðulstiltøkini verða minkað og í hvønn mun altjóða fíggjarmarknaðir verða ávirkaðir av hesum.

Lítil ivi er um, at altjóða partabrævamarknaðir eisini verða stimbraðir av teimum stuðulstiltøkum, sum miðbankar seta í verk, og av lágum rentum. Flestu av partabrævavísitølunum í heiminum eru á methøgum stigi, hóast útlit eru fyri lágum búskaparvøkstri næstu árini. Talva 6 niðanfyri vísir vøkstur í BTÚ í ársins prísum fyri útvald lond.

**Talva 6. Árligur vøkstur í BTÚ í ársins prísum 2008-2015 býttur á lond**

| *% um árið í føstum prísum* | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Føroyar | -0,8 | -1,7 | 7,0 | 2,4 | 3,0 | 7,5 | 4,5 | *2,5* |
| Danmark | 3,4 | -4,6 | 4,9 | 1,9 | 1,7 | 1,5 | 1,6 | *3,0* |
| Ísland | 12,7 | 2,4 | 2,2 | 4,9 | 4,3 | 5,6 | 3,2 | *6,4* |
| Noreg | 11,0 | -6,9 | 6,8 | 8,1 | 5,7 | 3,5 | 2,5 | *1,9* |
| Stóra Bretland | 2,5 | -2,4 | 5,1 | 3,8 | 2,3 | 3,5 | 4,9 | *4,4* |
| USA | 1,7 | -2,0 | 3,8 | 3,7 | 4,2 | 3,7 | 3,7 | *4,8* |
| Evruøkið | 2,3 | -3,5 | 2,7 | 2,7 | 0,6 | 0,9 | 1,8 | *2,0* |
| OECD-miðal | 2,6 | -2,4 | 4,4 | 3,8 | 2,9 | 2,8 | 3,5 | *3,9* |

*Kelda: OECD og Hagstovan.*
*Viðm.: Tølini fyri 2014 og 2015 eru metingar.*

## Almenn fíggjarmál

Her verður stutt hugt eftir gongdini í úrslitinum hjá landskassanum og tí almenna tilsamans síðstu árini. Fíggjarmálaráðið gav í februar 2014 út eina meting av konjunkturjavnaða úrslitinum fyri tað almenna tilsamans. Í fylgiskjali A eru dagførdar uppgerðir fyri tíðarskeiðið 2001-2014. Búskaparráðið hevur eisini útgivið greining av haldførinum í almenna búskapinum. Báðar metingarnar vísa, at verða ikki ítøkilig tiltøk framd næstu árini fyri at bøta um javnvágina millum almennu inntøkurnar og útreiðslurnar, kann roknast við, at almenna skuldin fer at vaksa, sum frá líður.

Hetta merkir í stuttum, at almenni búskapurin er ikki haldførur yvir longri áramál. Tí kann roknast við, at almenna kredittvirðið versnar, sum frálíður, og at rentustigið og rentuútreiðslur hjá landinum tí fara at hækka. Hetta fer at gera tað torførari at fáa javnvág millum almennu útreiðslurnar og inntøkurnar og fer helst eisini at avmarka møguleikarnir at reka sjálvstøðugan fíggjarpolitikk í framtíðini.

Mynd 11 vísir gongdina í inntøkum og útreiðslum hjá landskassanum og í RLÚ-úrsliti síðani 1997 við fyribils mettum tølum fyri 2014, játtanartølum fyri 2015 og tølum fyri 2016 úr uppskotinum til játtanarkarmar. Á myndini sæst, at at útreiðslurnar hjá landskassanum eru vaksnar meira enn inntøkurnar síðani 2007, og landskassin hevur havt hall øll árini síðani 2007. Myndin vísir eisini, at inntøkurnar hjá landskassanum ávirkast nógv av konjunkturgongdini í samfelagnum, meðan útreiðslurnar eru meira støðugar.

**Mynd 11**

**Úrslit landskassans, mió. kr., 1997 til 2020**




Viðm.: Tølini fram til og við 2013 eru roknskapartøl. Tølini fyri 2014 eru mett tøl.
Tølini fyri 2015 eru játtanartøl, og tølini fyri 2016-2020 eru úr uppskotinum til játtanarkarmar.
* Úrslitið fyri 1998 er ávirkað av eftirgeving av donskum ríkislánum til Føroyar á 900 mió. kr.
Kelda: Gjaldstovan.

Myndirnar 12 og 13 vísa eisini, at skattatrýstið í landinum er lækkað munandi síðani 2007, meðan lutfallið millum almennu útreiðslurnar og BTÚ hevur verið meira støðugt.

Mynd 12

Almennar inntøkur og útreiðslur (land, kommunur og sosialir grunnar), % av BTÚ, 1998 til 2013




Kelda: Hagstovan.

Greiningin hjá Búskaparráðnum av haldførinum í almenna búskapinum vísir, sum nevnt, at útlit eru til hækkandi skuld næstu árini, verða ikki tiltøk framd til tess at betra um javnvágina millum almennu inntøkurnar og útreiðslurnar.

Mynd 13

Skattainntøkur tess almenna í mió. kr., 1998 til 2013




Kelda: Hagstovan.

Mynd 14 vísir gongdina í bruttoskuld og innistandandi hjá landinum. Gongdin síðstu árini, har ið inntøkurnar hjá landskassanum frá skattum og avgjøldum ikki eru vaksnar í sama mun sum útreiðslurnar, hevur givið eina verri javnvág millum inntøkur og útreiðslur hjá landinum, sum sæst aftur sum vaksandi langfreistað skuld síðani 2007 í mynd 14.

**Mynd 14**

**Landskassans langfreistaða skuld og innistandandi í mió. kr. og % av BTÚ, 1997 til 2014**




Kelda: Gjaldstovan.

Fyri haldførið á fíggjarpolitikkinum hevur tað týdning, at nettoskuldin yvir longri áramál ikki veksur skjótari enn samlaðu inntøkurnar í samfelagnum, sum skulu fíggja rentuútreiðslurnar av skuldini. Hetta merkir, at nettoskuld í % av BTÚ ikki er støðugt vaksandi, tá ið atlit eisini eru tikin at konjunkturstøðuni.

Talva 7 vísir úrslit fyri tað almenna tilsamans og almenna nettoskuld í % av BTÚ býtt á lond og ár. Talvan vísir, at almenna skuldin í Føroyum er ikki høg sammett við fleiri onnur lond í Vesturheiminum.

**Talva 7. Úrslit fyri tað almenna tilsamans og almenn nettoskuld í % av BTÚ, býtt á lond**

| | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| *Úrslit hjá tí almenna, % av BTÚ* | | | | | | | | | |
| Føroyar | 1,9 | 2,1 | -2,8 | -4,7 | -3,5 | -2,1 | -2,1 | -2,5 | *-1,9* |
| Danmark | 5,0 | 4,8 | 3,3 | -2,8 | -2,7 | -2,0 | -3,9 | -0,9 | -1,4 |
| Ísland | 6,3 | 5,4 | -13,5 | -10,0 | -10,1 | -5,6 | -3,8 | -2,1 | 1,9 |
| Stóra Bretland | -2,8 | -2,9 | -5,0 | -11,3 | -10,0 | -7,8 | -8,0 | -5,8 | -5,3 |
| USA | -2,4 | -3,2 | -7,0 | -13,5 | -11,3 | -9,9 | -8,6 | -5,8 | -5,5 |
| | | | | | | | | | |
| *Almenn nettoskuld, % av BTÚ* | | | | | | | | | |
| Føroyar | 3,5 | -3,4 | -2,2 | 1,4 | 5,6 | 16,1 | 11,4 | 8,9 | 7,0 |
| Danmark | 1,9 | -3,8 | -6,1 | -4,6 | -1,6 | 2,6 | 7,5 | 5,6 | 6,9 |
| Ísland | 20,9 | 18,3 | 55,6 | 70,3 | 69,2 | 64,4 | 66,8 | 65,8 | 60,9 |
| Stóra Bretland | 38,0 | 38,3 | 47,5 | 61,9 | 71,6 | 76,2 | 80,9 | 82,5 | 83,9 |
| USA | 44,8 | 44,5 | 50,5 | 62,1 | 69,7 | 76,1 | 79,4 | 80,4 | 80,8 |

*Kelda: Hagstovan og IMF.*
*Viðm.: Tølini fyri almenna úrslitið í Føroyum í 2014 og nettoskuld í 2013 og 2014 eru metingar.*

## Uppskotið til játtanarkarmar

Talvan niðanfyri vísir uppskotið til játtanarkarmar fyri 2016-2020 útgreinað.

| **Talva: Útgreinaðir játtanarkarmar fyri 2016-2020** | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| *Mió. kr.* | **2016** | **2017** | **2018** | **2019** | **2020** |
| Rakstrarútreiðslur, §1-§12: | | | | | |
| §1 Løgtingið | 48,3 | 46,3 | 46,3 | 46,3 | 46,3 |
| §2 Løgmansfyrisitingin | 56,1 | 54,8 | 54,8 | 55,3 | 55,3 |
| §3 Fíggjarmál | 344,3 | 347,2 | 353,6 | 359,5 | 365,3 |
| §5 Fiskivinnumál | 169,7 | 169,7 | 169,7 | 169,7 | 169,7 |
| §6 Vinnumál | 315,8 | 316,0 | 316,0 | 316,0 | 316,0 |
| §7 Mentamál | 1.001,3 | 1.004,9 | 1.008,4 | 1.012,2 | 1.015,5 |
| §11 Heilsumál | 984,9 | 992,7 | 1.000,7 | 1.008,7 | 1.016,7 |
| §12 Almannamál | 1.449,0 | 1.453,7 | 1.475,6 | 1.495,1 | 1.516,7 |
| **Rakstrarútreiðslur tilsamans** | **4.369,4** | **4.385,3** | **4.425,1** | **4.462,8** | **4.501,5** |
| | | | | | |
| **Løguútreiðslur, §1-§12** | **273,0** | **280,9** | **285,0** | **285,0** | **285,0** |
| **Rentuútreiðslur, netto** | **77,0** | **73,0** | **69,0** | **69,0** | **69,0** |
| | | | | | |
| **Inntøkur** | **4.775,4** | **4.837,4** | **4.887,4** | **4.937,4** | **4.987,4** |
| | | | | | |
| **RLÚ-úrslit** | **56,0** | **98,2** | **108,3** | **120,6** | **131,9** |

## Uppskotið til játtanarkarmar býtt á greinar

Niðanfyri er uppskotið til játtanarkarmar fyri árini 2016-2020 býtt á greinar. Tølini fevna um øll játtanarsløg undantikið løgujáttanir, t.e. rakstrarjáttanir, stuðulsjáttanir og lógarbundnar játtanir. Løguætlanin er lýst serskilt.

**Rakstrarkarmar fyri § 1 Løgtingið 2016-2020**

| Rakstrarkarmar fyri § 1 Løgtingið 2016-2020 | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **§ 1 Løgtingið, *mió. kr.*** | **FL 2015** | **Æ 2016** | **Æ 2017** | **Æ 2018** | **Æ 2019** | **Æ 2020** |
| **Rakstrarkarmur** | **48,9** | **48,3** | **46,3** | **46,3** | **46,3** | **46,3** |

### Framskrivingar

Raksturin er framskrivaður soleiðis í 2016:

- Eftirløn og bíðiløn til løgtingsfólk, løgtingsval verður í 2015
- Kanning framd av kanningarstjóra liðug í 2015

**Rakstrarkarmar fyri § 2 Løgmansfyrisitingina 2016-2020**

**Rakstrarkarmar fyri § 2 Løgmansfyrisitingina 2016-2020**

| § 2 Løgmansfyrisitingin, *mió. kr* | FL 2015 | Æ 2016 | Æ 2017 | Æ 2018 | Æ 2019 | Æ 2020 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarkarmur** | **64,5** | **56,1** | **54,8** | **54,8** | **55,3** | **55,3** |

## Framskrivingar

Raksturin er framskrivaður soleiðis í 2016:

- Nýggj lønar- og eftirlønarskipan til landsstýrisfólk og løgmann
- Ætlandi verður fult virksemi í sendistovuni í Moskva
- Bíðiløn til landsstýrisfólk, vegna løgtingsval í 2015

## Rakstrarsparingar

Sparingar á 0,7 mió. kr. verða framdar við tillagingum í starvsfólkahópinum, virkseminum og í stuðulspartinum.

## Nýskipan

Felagstiltak at savna landsfyrisitingina á 10 mió. kr. í 2016. Útgreiningar halda áfram í 2015 av, hvussu hetta skal fremjast.

**Rakstrarkarmar fyri § 3 Fíggjarmál 2016-2020**

**Rakstrarkarmar fyri § 3 Fíggjarmál 2016-2020**

| § 3 Fíggjarmál, *mió. kr.* | FL 2015 | Æ 2016 | Æ 2017 | Æ 2018 | Æ 2019 | Æ 2020 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarkarmur | 346,4 | 344,3 | 347,2 | 353,6 | 359,5 | 365,3 |

### Framskrivingar

Raksturin er framskrivaður soleiðis í 2016:

- Tænastumannaeftirlønir, við mettum vøkstri av fráfarandi tænastumonnum
- Stuðul til rentuútreiðslur, við verandi rentustøði

### Raðfestingar

Talgilding av føroyska samfelagnum er stór verkætlan sum Fíggjarmálaráðið og Vinnumálaráðið varða av. Talgildingin skal nýmótansgera og rationalisera umsiting og tænastur í samfelagnum. Leysliga mett 30 til 50 mió. kr. um nøkur ár. Settar verða 7 mió. kr. av til endamálið í 2016.

### Nýskipanir

Felagstiltøk eru fyri allar greinar, sum eru útgjaldsskipanir og útveitan av almennum tænastum. Útgreiningar halda fram í 2015 av, hvussu hetta skal fremjast. Felagstiltøkini væntast at geva 13,5 mió. kr. í sparingum. Verkætlanin við útgjaldsskipanum verður ætlandi partur av talgildingar-verkætlanini.

### Tillagingar

Stig verða tikin til at tálma útreiðsluvøkstrinum í tænastumannaeftirlønum.

### Rakstrarsparingar

Framskrivað er við sparing á stovnum undir Fíggjarmálaráðnum í 2016 og 2017. Harumframt verður játtanin hjá TAKS lækkað 5,4 mió. kr. í 2016 vegna framda umlegging av skattaskipanini, sum hevur við sær bíligari rakstur enn frammanundan.

**Rakstrarkarmar fyri § 5 Fiskivinnumál 2016-2020**

| Rakstrarkarmar fyri § 5 Fiskivinnumál 2016-2020 | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **§ 5 Fiskivinnumál, *mió. kr.*** | **FL 2015** | **Æ 2016** | **Æ 2017** | **Æ 2018** | **Æ 2019** | **Æ 2020** |
| **Rakstrarkarmur** | **173,1** | **169,7** | **169,7** | **169,7** | **169,7** | **169,7** |

## Framskrivingar

Raksturin er framskrivaður soleiðis í 2016:

- Flutningsstuðul
- Hvalateljing, verður framd í 2015

## Nýskipanir og raðfestingar

*Fiskivinnunýskipan*
Hildið verður fram við arbeiðinum við fiskivinnunýskipanini.

## Rakstrarsparingar

Tær sparingar, ið ikki verða framdar við tillagingum, verða framdar á ymsum økjum innan samlaðu greinina.

**Rakstrarkarmar fyri § 6 Vinnumál 2016-2020**

| **Rakstrarkarmar fyri § 6 Vinnumál 2016-2020** | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **§ 6 Vinnumál, *mió. kr.*** | **FL 2015** | **Æ 2016** | **Æ 2017** | **Æ 2018** | **Æ 2019** | **Æ 2020** |
| **Rakstrarkarmur** | **315,9** | **315,8** | **316,0** | **316,0** | **316,0** | **316,0** |

## Framskrivingar

Raksturin er framskrivaður soleiðis í 2016:

- Barsilsskipanin

## Raðfestingar

*Talgilding av Føroyum*
Raðfesting av játtan til talgilding av føroyska samfelagnum heldur fram. Verkætlanin hevur til endamáls at gera umsitingina effektivari umframt at geva borgarunum betri møguleikar at avgreiða egin viðurskiftir.

*Integratión*
Ætlanin er, at útlendingar sum flyta til Føroyar fáa góða og rætta vegleiðing og at teir fáa atgongd til tey undirvísingartilboð, sum longu eru.

*Arbeiðsmarknaðurin*
Semingsmannaskipanin verður raðfest.

## Rakstrarsparingar

Ætlanin er í høvuðsheitum at fremja tillagingar við ymiskum rakstrarsparingum á §6.

**Rakstrarkarmar fyri § 7 Mentamál 2016-2020**

**Rakstrarkarmar fyri § 7 Mentamál 2016-2020**

| § 7 Mentamál, *mió. kr.* | FL 2015 | Æ 2016 | Æ 2017 | Æ 2018 | Æ 2019 | Æ 2020 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarkarmur | 989,4 | 1.001,3 | 1.004,9 | 1.008,4 | 1.012,2 | 1.015,5 |

## Framskrivingar

Raksturin er framskrivaður soleiðis í 2016:

- Fólkaskúlin
- Miðnámsútbúgvingar
- Lestrarstuðul

Við fyriliggjandi játtanarkørmum skulu tillagingar fremjast, sum svara til eina minking í útreiðsluvøkstrinum uppá 10,8 mió. kr. í 2016. Við framskrivingum og ætlaðu tillagingunum veksur raksturin á § 7 Mentamál úr 989,4 mió. kr. í 1.001,3, sum svarar til 11,9 mió. kr. ella 1,2%.

## Tillagingar og rakstrarsparingar

Arbeitt verður áhaldandi við at tálma útreiðsluvøksturin við umskipanum og øðrum tillagingum í rakstrinum á:

- Fólkaskúla- og sernámsfrøðiliga økinum
- Miðnámsskúlaøkinum
- Hægri útbúgvingar- og granskingarøkinum
- Mentanarøkinum

Arbeitt verður áhaldandi við tillagingum í fólkaskúlanum og á sernámsfrøðiliga økinum. Høvuðsendamálið við tillagingunum er at fáa ein enn betri skúla, sum rúmar øllum næmingum, har ið øll fáa røttu og neyðugu avbjóðingarnar.

Á miðnámsskúlaøkinum eru nýggjar útbúgvingarskipanir, bæði innan gymnasialu útbúgvingarnar og yrkisútbúgvingarnar. Farið varð undir at útbúgva næmingar eftir nýggju gymnasialu breytaskipanini  og yrkisnámi í august í 2013. So hvørt sum nýggju skipanirnar fara at fevna um allar árgangir, verður raksturin skynsamari, m.a. tí at nýggju útbúgvingarnar eru betur samskipaðar.

Arbeitt verður eisini við bygnaðarligum broytingum á miðnámsskúlaøkinum fyri at gera raksturin skynsamari. Ein partur av hesum tillagingum verður gjørdar í kjalarvørrinum av, at Miðnámsskúlin í Marknagili og aðrar um- og útbyggingar á miðnámsskúlum verða tiknar í nýtslu. Innan hægru útbúgvingarnar og skeið verður eisini neyðugt at rationalisera raksturin fyri framhaldandi at hava møguleika at seta í verk viðkomandi útbúgvingar, soleiðis at ein størri partur av ungdóminum fær tilboð og lestrarmøguleikar í Føroyum. Hetta er í tráð við í heildarætlanini um fólkafráflyting og fólkavøkstur.  Ein partur av raðfestingunum á útbúgvingarøkinum fer framhaldandi til neyðugar eftirútbúgvingar av lærarum og øðrum starvsfólki á økinum.

Økti raksturin saman við vinninginum av neyðugum tillagingum á § 7 Mentamál fara sostatt í mestan mun at verða nýttar til at fjøltátta og betra um útbúgvingarøkið, harundir tilboðini til næmingar við serligum avbjóðingum og at raðfesta týðandi øki á mentanarøkinum.

**Rakstrarkarmar fyri § 11 Heilsumál 2016-2020**

| **Rakstrarkarmar fyri § 11 Heilsumál 2016-2020** | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **§ 11 Heilsumál, *mió. kr.*** | **FL 2015** | **Æ 2016** | **Æ 2017** | **Æ 2018** | **Æ 2019** | **Æ 2020** |
| **Rakstrarkarmur** | **968,1** | **984,9** | **992,7** | **1.000,7** | **1.008,7** | **1.016,7** |

## Framskrivingar:

Raksturin er framskrivaður soleiðis í 2016:

- Heilsutrygdarveitingar eru framskrivaðar
- Serstakur sjúkrahúsheilivágur er framskrivaður
- Serviðgerð uttanlands er framskrivað
- Sjúklingatryggingin er framskrivað, orsakað av øktum tryggingarmálum

Heilsutrygdarveitingar verða framskrivaðar við væntaðu økingini í veitingum. Serstakur sjúkrahúsheilivágur verður framskrivaður orsakað av økingini í tilboðum og av tí, at fleiri fólk verða sett í viðgerð. Serviðgerð uttanlands verður framskrivað orsakað av vøkstrinum í viðgerðarmøguleikum. Harumframt verður sjúklingatryggingin framskrivað, tí talið av tryggingarmálum veksur.

Neyðugt verður at fremja nýskipanir og rakstrartillagingar á heilsuøkinum fyri at fíggja vøksturin í virksemi, og tí at stórar avbjóðingar eru við serlæknamanningini.

## Tillagingar

*Liðugt viðgjørdir sjúklingar*
Landsstýrismaðurin hevur lagt fyri Løgtingið uppskot í sambandi við, at gjald fer at verða tikið frá avvarðandi myndugleikum fyri liðugt viðgjørdar sjúklingum, ið uppihalda sær í sjúkrahúsverkinum. Gildiskoma er sett til 1. juni 2015.

*Umlegging av heilsuverkinum*
Afturat hesum verður framhaldandi arbeitt við at fremja umleggingar av virkseminum í Heilsuverkinum. Í hesum liggur, at enn meira samstarv verður millum sjúkrahúsini. Stórar avbjóðingar eru við ættarliðsskiftum á skurðøkinum, og fyri at kunna veita umstøður, ið eru kappingarførar við umheimin, er neyðugt at uppraðfesta á økinum.

Gjørd verður ein ætlan fyri, hvørji serlæknaøki natúrliga eru partur av føroyska heilsuverkinum, hvussu tað skal vera skipað, og hvørjar tænastur heilsuverkið eigur at keypa uttanlands. Á henda hátt er vónin at fáa meira nyttu úr avmarkaða tilfeinginum í heilsuverkinum.

## Nýskipanir

*Heilsunýskipan*
Heilsunýskipanin hevur sum endamál at fáa til vega samanhangandi heilsutænastur, sum svara til ynskini og tørvin hjá tí einstaka, og møta teimum avbjóðingum, sum eru fyri framman, bæði tá ið

umræður vaksandi tal av eldri, tøkniligari menning og vaksandi krøvum til viðgerð og viðgerðarmøguleikar.

Visjónin fyri nýskipanina er einføld, men framsøkin: Føroyingar skulu hava betri møguleika at liva eitt heilsugott lív uttan sjúkur. Hóast setningurin er einfaldur, er loysnin kompleks og samansett. Ikki minst havandi í huga, at fíggjarliga tilfeingið er avmarkað, meðan eftirspurningurin eftir tænastum veksur.

Vegna fleiri viðgerðartilboð og vaksandi tal av borgarum, ið gerast eldri, er neyðugt at gera tillagingar við heilsunýskipanini. Arbeitt verður við at seta átøk í verk. Ætlanin er, at skipanin skal gera, at fólk hava eitt heilsubetri lív, og at tey sostatt í øðrvísi og minni mun koma at hava brúk fyri heilsuverkinum.

*Aðrar nýskipanir*
Arbeitt verður framhaldandi við KT-menning. Herundir at menna leiðslukunningina í talgildu heilsuskipanini, soleiðis at virksemið á heilsuøkinum kann verða lýst við góðskutryggjaðum hagtølum. Trygdar- og dygdararbeiðið verður framhaldandi ment. Eisini er ætlanin at økja um neyðhjálpina.

## Inntøkutiltøk

*Rationaliseringar innan Ílegusavnið*
Arbeitt verður fram ímóti, at Ílegusavnið skal hava ein enn størri part av virkseminum eginfíggjaðan. Í 2016 verður kravið um inntøkur økt. Endamálið er at fáa inntøkur til at fíggja virksemið hjá stovninum, soleiðis at landið fær sín part av síni íløgu í skipanina aftur. Hetta krevur, at stovnurin í størri mun skal arbeiða við marknaðarføring og sølu av upplýsingum og tænastum.

*Útflutningur hjá Apoteksverkinum*
Apoteksverkið skal útflyta heilivág, og skal hetta geva ávísa inntøku í 2016.

**Rakstrarkarmar fyri § 12 Almannamál 2016-2020**

| Rakstrarkarmar fyri § 12 Almannamál 2016-2020 | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **§ 12 Almannamál, *mió. kr.*** | **FL 2015** | **Æ 2016** | **Æ 2017** | **Æ 2018** | **Æ 2019** | **Æ 2020** |
| **Rakstrarkarmur** | **1.422,0** | **1.449,0** | **1.453,7** | **1.475,6** | **1.495,1** | **1.516,7** |

## Framskrivingar

Raksturin er framskrivaður soleiðis í 2016:

- Fólkapensjón, 13 mió. kr. vegna hækkaðu pensjónsviðbótina á 350 kr. um mánaðin í 2015 og økt tal av pensjónistum
- Arbeiðsfremjandi tiltøk verða framskrivað
- Mett verður, at aðrar lógarbundnar játtanir verða næstan óbroyttar komandi árini, eitt nú vanlig forsorg og fyritíðarpensjón
- Vardu bústaðirnir í Norðoyggjum og Eysturoynni til fólk við serligum tørvi lata upp seinni í ár; játtanin verður hækkað við 12,5 mió. kr. til fult virksemi í 2016
- Eftir ætlan letur virknis- og umlættingardepilin á Sandi upp miðskeiðis í 2016, og 1,5 mió. kr. eru settar av til endamálið; játtanin í 2017 er hækkað við 1,5 mió. kr. til fult virksemi
- Kommunuval verður í 2016, og løgtingsval og fólkatingsval verða eftir ætlan í 2019

## Nýskipanir og raðfestingar

*Pensjónsnýskipan*
Hildið verður fram við arbeiðinum við pensjónsnýskipanini.

*Arbeiðsfremjandi tiltøk*
Lógin um arbeiðsfremjandi tiltøk skal sambært lógini eftirmetast. Væntandi verður aðalorðaskifti í løgtinginum um skipanina í ár, og tað kann hugsast, at dagføringar verða gjørdar í skipanini.

*Harðskapar í parløgum*
Ætlanin er at víðka um heildarætlanina "Harðskapur í parløgum" til eisini at fevna um kynsligan ágang.

*Endurvenjing*
Neyðugt er at menna økið endurvenjing frameftir fyri at tryggja, at fólk koma skjótast gjørligt aftur í arbeiði. Arbeitt verður við lógaruppskoti innanfyri økið. Hetta kann vera við til at tálma útreiðsluvøksturin.

*Serliga skipað miðnám*
Almannamálaráðið og mentamálaráðið samstarva um at menna fleiri tilboð innanfyri *serliga skipað miðnám*. Hetta er liður í at betra um umstøðurnar fyri familjur við børnum, ið bera brek. Hetta er í tráð við í heildarætlanini um fólkafráflyting og fólkavøkstur.

*Trivnaðartænastan*

Farið verður undir at orða ein tænastupolitikk, sum skal vera grundarlag fyri eini tænastulóg, sum ætlandi verður gjørd seinni í ár. Endamálið við lógini er at fáa greiðari ásetingar um innihaldið í tænastuni og at betra um rættartrygd hjá borgaranum. Samstundis verður framhaldandi arbeitt við at fáa ein skynsamari rakstur í Trivnaðartænastuni kring landið.

**Inntøkukarmar fyri § 20 Inntøkur 2016-2020**

| Inntøkukarmar fyri § 20 Inntøkur 2016-2020 | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| *Mió. kr.* | **FL 2015** | **Æ 2016** | **Æ 2017** | **Æ 2018** | **Æ 2019** | **Æ 2020** |
| Inntøkur, §20: | | | | | | |
| **Inntøkur tilsamans, íroknað rentuútreiðslur, netto** | **4.467,2** | **4.698,4** | **4.764,4** | **4.818,4** | **4.868,4** | **4.918,4** |

## Rentuútreiðslur og -inntøkur

Fotreytirnar eru, at skuldin frá 2016 er óbroytt ella lækkar, við verandi rentustøði. Eisini verður hildið fram við broyttari samanseting av virðisbrøvum í umsitingini av landsins gjaldføri, soleiðis at avkastið kann betrast.

## Skatta- og avgjaldsinntøkur

Í fortreytunum fyri inntøkunum verður BTÚ í ársins prísum mett at vaksa um 3% í 2016. Í játtanarkørmunum eru inntøkurnar framskrivaðar í ársins prísum í 2016, men árini 2017-2020 verður framskrivað í føstum prísum.

Inntøkurnar frá vanligum landsskatti og meirvirðisgjaldi eru framskrivaðar við áleið 3,5% í 2016 sammett við nýggjastu metingarnar fyri 2015 og umleið 1,5% árini 2017-2020.

Á teimum skatta- og inntøkujáttanum, har hetta verður hildið vera neyðugt, eru gjørdar serstakar metingar út frá fortreytunum fyri játtanina.

Eftir galdandi lóg fellur skatturin og avgjaldið frá fiskivinnuni burtur við ársenda 2015. Inntøkur frá tilfeingisskatti og avgjaldi á fiskatilfeingi halda fram í 2016 og frameftir.

Í 2016 eru harumframt roknað við nýggjum inntøkutiltøkum fyri 95 mió. kr. Hesi inntøkur verða í høvuðsheitum fingnar frá fiskivinnuni og alivinnuni. Fortreytin er, at avgjaldslóggávan verður partur av fiskivinnunýskipanini, sum arbeitt verður við.

## Løguætlan 2016-2024

Samlaði løgukarmurin fyri 2016 verður 273 mió. kr. Árligi løgukarmurin í langtíðarløguætlanini fyri 2016-2020 er millum 273 mió. kr. til 285 mió. kr.

| **Løgukarmar fyri 2016** | |
|---|---|
| *Mió. kr.* | **2016** |
| §1 Løgtingið | 0,0 |
| §2 Løgmansfyrisitingin | 2,0 |
| §3 Fíggjarmál | 104,5 |
| §5 Fiskivinnumál | 0,0 |
| §6 Vinnumál | 17,0 |
| §7 Mentamál | 109,5 |
| §11 Heilsumál | 34,0 |
| §12 Almannamál | 6,0 |
| **Løgujáttan tilsamans** | **273,0** |

| **Løgukarmar fyri 2016-2020** ***(mió. kr.)*** | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Ár** | **2016** | **2017** | **2018** | **2019** | **2020** |
| **Løgur § 1 - § 12 tilsamans** | **273.000** | **280.900** | **285.000** | **285.000** | **285.000** |

### Frágreiðing um løguætlanina

Niðanfyri er í høvuðsheitum greitt frá størstu løgunum næstu árini, sum eru byrjaðar ella fara í gongd í 2016.

**Skúladepilin við Marknagil** fer eftir verklagslógini at kosta 515 mió. kr. Játtaðar verða 108,5 mió. kr. í 2016, til at gera verkætlanina lidna.

Arbeiðið við **Viðareiðistunlinum** heldur á, og 79,5 mió. kr. verða játtaðar afturat til verkætlanina næstu tvey árini.

Løgujáttanin til **Landssjúkrahúsið** verður brúkt, sum tilskilað í løgtingslóg nr. 46. frá 10. mai 2013, um broyting í løgtingslóg um at høvuðsumvæla, útbyggja og nútíðargera Landssjúkrahúsið. Næstu árini verða íalt 347 mió. kr. játtaðar til endamálið.

Almenna Partafelagið **P/F Eystur- og Sandoyartunlar** varð stovnað í 2014, og 400 mió. kr. verða játtaðar til felagið í einum 10 ára skeiði. Játtanin hækkar stigvíst næstu árini.

Nýtt **Nólsoyarskip** verður bygt fyri 50 mió. kr. Byggingin heldur fram, og 26,6 mió. kr. verða játtaðar næstu tvey árini til at gera skipið liðugt.

Aðrar løgur eru millum annað **Umvæling av almennum bygningum** fyri 22 mió. kr. árliga og verkætlan um orkusparing í almennum bygningum. **Bygging ella útvegan av bústøðum** innan

almannamál fyri 6,0 mió. kr. **Trygdartiltøk, vegagerð** fyri 6 mió. kr. árliga, og **Medicoteknisk tól** hjá sjúkrahúsum fyri 9,0 mió. kr. árliga.

**Løgur seinri, til 2024**

Til **Farleið til Dals** verða 43,5 mió. kr. játtaðar í árunum 2017-2022. **Vegurin omanfyri Skálafjørð** verður raðfestur árini 2018-2021, og 50 mió. kr. verða játtaðar til endamálið. Til **Innkoyringarvegin til Havnar** verða játtaðar 94 mió. kr. samanlagt í árunum 2018-2022.

**Hvalbiartunnil** verður raðfestur árini 2018-2021 fyri 165 mió. kr. **Tunlarnir norður um Fjall** verða bygdir árini 2021-2024 fyri 250 mió. kr. **Tunnil millum Gøtudal/Kambsdal og Skálafjørð** verður gjørdur árini 2021-2024 fyri 122 mió. kr. **Farleið til Fámjin** verður raðfest árini 2022-2024 fyri 70 mió. kr.

Harafturat verður **Tjørnuvíkarvegurin** tryggjaður fyri 25 mió. kr. árini 2018-2024. Til **Inni í Fjørð, Kollafjørður** verða 27 mió. kr. játtaðar árini 2019-2021. Til tess at dagføra **Leirvíkar- og Kollfjarðartunnilin** verða 46,5 mió. kr. játtaðar árini 2021-2024, og til **farleið til Vestmanna** verða 20 mió. kr. játtaðar árini 2021–2024. Harumframt eru aðrar verkætlanir.

Til **løgur og umvælingar av skipum** verða 46 mió. kr. játtaðar samanlagt. Smærri og størri upphæddir verða játtaðar flestu ár.

Innan mentamál fær **Tjóðleikhúsið** 45 mió. kr. játtaðar árini 2017-2019. **Fróðskaparsetrið** verður raðfest árini 2020-2024 fyri 55,2 mió. kr., og **Søvn Landsins** fáa játtað 49 mió. kr. árini 2020-2023. Til **víðkað tilboð til børn og ung við serligum tørvi** verða 15,0 mió. kr. játtaðar árini 2019-2020.

Innan almannamál fær **Stovnur fyri heilaskadd** játtað 14 mió. kr. árini 2017-2018. **Sambýli til fólk við sálarsjúku** fáa játtað 21,8 mió. kr. árini 2018-2021, og til tvey **Sambýli til menningartarnað** verða samanlagt játtaðar 43,8 mió. kr. í árini 2022-2024.

Aðrar løgur enn omanfyri nevndu verða eisini framdar.

# Fylgiskjal A: Dagførd uppgerð av konjunkturjavnaðum úrsliti fyri almenna geiran

*Metingar av konjunkturjavnaðum úrsliti hjá tí almenna kunnu vera týðandi íkast, tá ið fíggjar- og búskaparpolitikkurin hjá landinum og tí almenna verður lagdur til rættis. Hetta krevur sjálvsagt, at uppgerðirnar verða rætt brúktar og við neyðugum fyrivarnum og saman við øðrum lyklatølum um almenna búskapin. Tílíkar uppgerðir verða brúktar í øðrum londum, tá ið almenni fíggjar- og búskaparpolitikkurin verður lagdur til rættis. Í frágreiðingini niðanfyri eru dagførdar uppgerðir av konjunkturjavnaðum úrsliti fyri tíðarskeiðið 2001-2014. Árið 2014 er torført at meta um, við tað at endaligar uppgerðir av almenna búskapinum í 2014 eru ikki tøkar . Metingarnar fyri 2014 eru tískil óvissar.*

## Høvuðsniðurstøður

- Uppgerðirnar benda á, at tað almenna tilsamans hevði konjunkturjavnað hall á umleið 2% av BTÚ í 2014
- Hallið svarar til umleið 300 mió. kr. í nútíðarvirði og við støði í BTÚ fyri 2014
- Uppgerðirnar fevna um land, kommunur og sosialar grunnar undir einum
- Til sammetingar høvdu flestu OECD-lond konjunkturjavnað hall á 1-4% av BTÚ í 2014
- Størsti parturin av konjunkturjavnaða hallinum stavar sannlíkt frá hallinum hjá landinum
- Uppgerðirnar benda á, at *lágkonjunkturur* var árini 2008 til 2012 og *normalkonjunkturur* í 2013 og at *hákonjunkturur* var í 2014
- Úrslitini benda á, at skal javnvág fáast millum almennar inntøkur og útreiðslur, verður neyðugt við varandi tiltøkum á inntøku- og útreiðslusíðuni hjá tí almenna á umleið 300 mió. kr.
- Fyri haldførið í almenna búskapinum yvir longri áramál er umráðandi, at tiltøk verða sett í verk, sum betra javnvágina millum almennar inntøkur og útreiðslur – serliga um hugsað verður um tær broytingar, sum vera í aldurssamanseting næstu árini

## Inngangur

Fíggjarmálaráðið gav fyrstu ferð í februar 2014 út eina meting av konjunkturjavnaða úrslitinum fyri tað almenna tilsamans (sokallað *Cyclically Adjusted Budget Balance*). Niðanfyri eru dagførdar uppgerðir fyri tíðarskeiðið 2001-2014. Eins og greitt varð frá í frágreiðingini um konjunkturjavnaða úrslitið, eru øll hagtøl ikki tøk í Føroyum, sum vanliga verða brúkt til tílíkar uppgerðir. Tí er óvissan stór um tílíkar uppgerðir av tí almenna í Føroyum.

Uppgerðarhátturin, sum verður brúktur her, er meinlíkur uppgerðarháttum, sum danska Finansministeriet og OECD áður hava brúkt. Metingar av konjunkturjavnaðum úrsliti fyri almenna geiran kunnu vera týðandi íkast, tá ið fíggjar- og búskaparpolitikkurin hjá landinum verður lagdur til rættis. Hetta krevur sjálvsagt, at uppgerðirnar verða brúktar rætt og við neyðugum fyrivarnum og at uppgerðirnar verða brúktar saman við øðrum lyklatølum og ábendingum um almenna búskapin og um búskapin sum heild.

Konjunkturjavnaða úrslitið gevur ábendingar um, hvat úrslitið fyri almenna geiran hevði verið, um vit javna fyri ávirkanir frá konjunkturum á búskapin og serliga á almenna búskapin, tað er um *normalkonjunkturur* var í samfelagnum eitt ávíst tíðarskeið. Hetta úrslitið verður nevnt konjunkturjavnað úrslit fyri almenna geiran.

## Dagførdar uppgerðir av konjunkturjavnaðum úrsliti

Uppgerðir av konjunkturjavnaðum úrsliti fyri tað almenna fevna um almenna geiran sum heild, t.e. land, kommunur og sosialar grunnar undir einum.

Í talvu A1 og myndunum A1-A4 eru uppgerðirnar av konjunkturjavnaðurm úrsliti fyri almenna geiran vístar. Tað er umráðandi at gera sær greitt, at uppgerðirnar eru óvissar serliga í endanum og byrjanini á tíðarrøðini. Hetta merkir til dømis, at óvissan er størri í uppgerðunum fyri 2014 enn fyri 2010. Uppgerðirnar skulu tí lesast við fyrivarnum og ikki ov bókstavliga, men kunnu saman við øðrum vísitølum geva ábendingar um støðuna og haldførið í almenna búskapinum sum heild yvir longri áramál.

Talva A1 vísir, at sambært uppgerðunum hevði tað almenna konjunkturjavnað hall í 2014 á 2-2,5% av BTÚ. Uppgerðirnar benda sostatt á, at tað almenna hevði konjunkturjavnað hall á umleið 300 mió. kr. við støði í BTÚ fyri 2014.[1]

**Talva A1 Konjunkturjavnað úrslit fyri almenna geiran**

| | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Tað almenna tilsamans** (*í % av BTÚ*) | | | | | | | | | | | |
| Staðfest alment úrslit (a) | -2,3 | -1,8 | 2,0 | 2,1 | -2,8 | -4,8 | -3,5 | -2,1 | -2,1 | -2,5 | -1,5 |
| Ískoyti frá konjunkturstøðu (b) | -0,6 | -1,0 | 2,2 | 1,9 | -1,4 | -1,9 | -0,4 | -1,2 | -2,0 | 0,2 | 0,9 |
| Konjunkturjavnað úrslit (c = a-b) | -1,7 | -0,8 | -0,2 | 0,2 | -1,4 | -2,9 | -3,1 | -0,9 | -0,1 | -2,7 | -2,4 |
| Konjunkturfrávik | -1,7 | -2,6 | 5,6 | 4,7 | -3,6 | -4,8 | -0,9 | -3,0 | -5,2 | 0,5 | 2,3 |

* Uppgerðirnar fyri 2014 eru grundaðar á, at hallið í almenna geiranum tilsamans verður mett til 2% av BTÚ í 2014.
Kelda: Fíggjarmálaráðið.

Talva A2 vísir uppgerðir hjá IMF yvir konjunkturjavnað úrslit fyri tað almenna býtt á útvald lond og ár. Í talvu A2 sæst, at flestu stóru lond í Vesturheiminum høvdu konjunkturjavnað hall í 2013, sum var ájavnt við ella størri sammett við hallið í Føroyum.

**Talva A2 Konjunkturjavnað úrslit fyri almenna geiran býtt á lond**

| | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Tað almenna tilsamans** (*í % av BTÚ*) | | | | | | | | | | |
| Danmark | 4,2 | 3,8 | 2,2 | -1,9 | -1,4 | -0,8 | -2,6 | 0,2 | -0,5 | -2,3 |
| Ísland | 4,8 | 3,3 | -17,9 | -9,7 | -7,3 | -4,3 | -2,7 | -1,8 | 1,9 | -0,8 |
| Týskland | -2,2 | -1,1 | -1,4 | -1,2 | -3,5 | -1,3 | -0,1 | 0,5 | 0,7 | 0,4 |
| USA | -2,8 | -3,5 | -5,3 | -7,2 | -9,1 | -7,8 | -6,3 | -4,8 | -4,0 | -3,3 |
| Stóra Bretland | -4,7 | -5,3 | -6,7 | -10,3 | -8,4 | -6,0 | -5,8 | -3,8 | -4,1 | -3,6 |
| Evruøkið tilsamans | -2,3 | -2,2 | -3,3 | -4,7 | -4,9 | -3,7 | -2,7 | -1,3 | -1,2 | -1,0 |
| Føroyar | -0,2 | 0,2 | -1,4 | -2,9 | -3,1 | -0,9 | -0,1 | -2,7 | -2,4 | N/A |

Kelda: IMF. Fiscal Monitor. Oktober, 2014.

Á myndunum A1 og A2 sæst, at eftir valda uppgerðarháttinum var *lágkonjunkturur* í Føroyum frá 2008 til 2012, og at *normalkonjunkturur* var í 2013. Uppgerðirnar benda eisini á, at *hákonjunkturur* var í 2014. Á mynd A3 sæst, at konjunkturjavnaða hallið er minkað úr 3,1% í 2010 til nærum javnvág í 2012. Síðani er konjunkturjavnaða hallið vaksið til umleið 2,4% av BTÚ í 2014.

[1] Metingin 300 mió. kr. í halli í 2014 er grundað á eina *fyrivarnisreglu*, og til ber ikki at meta neyvari um úrslitið.

Orsøkin til, at hallið vaks frá 2012 til 2014 er, at konjunkturstøðan er munandi batnað frá 2012 til 2014, meðan almenna úrslitið bara lutvíst er batnað frá 2012 til 2014. Hetta sæst aftur í talvu A1, har ið ískoytið frá konjunkturstøðu var -2% í 2012 og 0,9% av BTÚ í 2014.

### Myndir A1-A4. Konjunkturjavnað framleiðsla og konjunkturjavnað úrslit




Viðm.: Tølini skulu lesast við tí fyrivarni, at HP-filtrið kann vera óneyvt í endanum á tíðarrøðum. T.d. skulu serliga árini 2001-2002 og 2013-2014 lesast við fyrivarni. Havandi fyrivarnini í huga, verður hildið sannlíkt, at konjunkturjavnaða úrsliti fyri tað almenna tilsamans var umleið 2% av BTÚ í 2014, sum svarar til umleið 300 mió. kr. í nútíðarvirði og við støði í mettum BTÚ fyri 2014.

[1] Konjunkturfrávikið er munurin millum staðfesta framleiðsu (í hesum føri bruttovirðisøking) og konjunkturjavnaða framleiðslu í % av konjunkturjavnaðari bruttovirðisøking.

[2] Grundrakstur er í hesum føri almenna úrslitið frádrigið rentur, vinningsbýti og ognarútreiðslur.

Kelda: Fíggjarmálaráðið.

## Orðalýsingar

**Almenn nettoskuld**
Almenna nettoskuldin fevnir um alla fíggjarliga skuld og áogn í almenna geiranum. Almenna nettoskuldin er øll fíggjarlig skuld í almenna geiranum frádrigið alla fíggjarliga áogn. Fíggjarliga áognin fevnir millum annað um tøka gjaldførið og aðrar fíggjarognir.

**Almennar útreislur tilsamans**
Stórsti parturin av almennu útreiðslunum er almenn nýtsla og veitingar til húsarhald, fyritøkur og feløg. Í 2011 vóru umleið 86% av almennu útreiðslunum almenn nýtsla og veitingar til húsarhald, fyritøkur og feløg. Harafturat eru almennu útreiðslurnar íløgur, rentuútreiðslur, stuðulsútreiðslur og aðrar útreiðslur. Landið og kommunurnar stóðu fyri 87% av almennu útreiðslunum í 2011.

**Bruttotjóðarúrtøka, stytt BTÚ**
Bruttotjóðarúrtøka er virðið á samlaðari privatari og almennari framleiðslu frádrigið virðið á ráevnum, vørum og tílíkum, sum verða brúkt í framleiðsluni. Verður eisini nevnt *Gross Domestic Product (GDP)* ella *Bruttonationalprodukt (BNP).*

**Bruttotjóðarúrtøka í føstum prísum**
Bruttotjóðarúrtøka í føstum prísum er uppgerð av BTÚ, har ið roynt verður at javna gongdina í BTÚ fyri prísvøkstri á ráevnum, vørum og tænastum. Vøksturin í BTÚ í føstum prísum verður vanliga brúktur sum vísital fyri búskaparvøkstur millum lond. Vøkstur í BTÚ í føstum prísum vísir vøkstur í framleiðsluni í mongdum. Verður nevnt *Real GDP* ella *realt BNP.*

**Bruttovirðisøking, stytt BVØ**
Bruttovirðisøking er bruttotjóðarúrtøka frádrigið vøruskattir netto, sum fevna um meirvirðisgjald, punktgjøld og aðrar vøruskattir og vørustudningar. Bruttovirðisøking verður ofta brúkt til at lýsa framleiðsluna býtta á vinnugreinar. Verður nevnt *Gross Value Added (GVA)* ella *Bruttoværditilvækst (BVT).*

**Fíggjarpolitiskt haldføri**
At fíggjar- og búskaparpolitikkurin er haldførur merkir, at rikni politikkurin hongur saman yvir longri áramál skilt soleiðis, at gongdin í almennu nettoskuldini sum partur av samfelagsbúskapinum er støðug yvir tíð. Hetta merkir, at almennu inntøkurnar kunna fíggja almennu útreiðslurnar og rentuútreiðslur av verandi almennari skuld yvir tíð. Fíggjar- og búskaparpolitikkurin kann sostatt vera haldførur yvir longri áramál, hóast tað almenna hevur hall í fleiri ár, um bara almenna nettoskuldin ikki er støðugt vaksandi partur av samfelagsbúkapinum yvir tíð.

**Konjunkturjavnað alment úrslit**
Konjunkturjavnaða almenna úrslitið er staðfest alment úrslit javnað fyri ávirkanir frá konjunkturstøðuni á almennar inntøkur og útreiðslur og aðrar ikki varandi og serliga umstøður, til dømis oljuprísir ella serligar íløgur.
Konjunkturjavnaða almenna úrslitið gevur sostatt eina meira rættvísandi mynd av veruligu gongdini í almenna búskapinum sum heild sammett við staðfesta almenna úrslitið.
Konjunkturjavnaða úrsliti hjá tí almenna verður aðrastaðni vanliga nevnt *Cyclically Adjusted Budget Balances* ella *strukturel saldo.*

**Konjunkturjavnað framleiðsla**
Konjunkturjavnað framleiðsla vísir mettu bruttotjóðarúrtøkuna í eini støðu, har ið roynt verður at javna fyri ávirkanir frá konjunkturunum í samfelagsbúskapinum. Roynt verður sostatt at vísa bruttotjóðarúrtøkuna í eini støðu við normalkonjunkturi í samfelagnum. Í eini støðu við normalkonjunkturi verður ofta sagt, at gongdin í samfelagsbúskapinum samsvarar við javnan vøkstur í prísum og lønum. Í frágreiðingini verður bruttovirðisøking brúkt sum vísital fyri framleiðslu heldur enn bruttotjóðarúrtøku, men hetta hevur ikki stóran týdning fyri úrslitini ella niðurstøður. Verður vanliga nevnd *potential output, potential GDP* ella *strukturelt/potentielt output (BNP).*

**Konjunkturfrávik**
Konjunkturfrávikið er munurin millum staðfesta framleiðslu og konjunkturjavnaða framleiðslu. Er konjunkturfrávikið størri enn 0, kunnu vit siga, at hákonjunkturur er í samfelagsbúskapinum; trýst er sum oftast á arbeiðsmarknaðinum, lítið av tøkari framleiðsluorku er í samfelagnum, og prísvøkstur er á flestu marknaðum. Er konjunkturfrávikið minni enn 0, kunnu vit siga, at lágkonjunkturur er í samfelagnum, lítið trýst er á arbeiðsmarknaðinum, og tøk framleiðsluorka er í samfelagnum. Konjunkturfrávik verður aðrastaðni ofta nevnt *outputgap* ella *outputgab*.

**Landskassaskuld**
Landskassaskuldin fevnir bara um skuld hjá landinum og harvið ikki um skuld hjá kommunum ella sosialum grunnum. Meginparturin av landskassaskuldini er lánsbrævalán. Landskassaskuldin er sum oftast ein bruttouppgerð av skuldini, har dentur verður lagdur á fíggjarligu skyldurnar hjá landinum (passivsíðuna á fíggjarjavnanum).

**RLÚ-úrslit**
Stytting fyri rakstrar-, løgu- og útlánsúrslit landskassans. RLÚ-úrslitið er munurin millum landskassans inntøkur og útreiðslur uppgjørt eftir meginreglunum í landsroknskapinum. RLÚ-úrslitið viðvíkur roknskapinum hjá landskassanum.

**Sosialir grunnar**
Hesir eru Arbeiðsloysisskipanin, Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, Barsilsskipanin og Heilsutrygd.

**Staðfestur almennur grundrakstur**
Staðfestur almennur grundrakstur verður í hesum føri lýstur sum staðfest alment úrslit frádrigið nettorentuútreiðslur (rentuútreiðslur minus rentuinntøkur). Verður vanliga nevnt *General Government Primary Balance* ella *faktisk primær saldo*.

**Staðfest alment úrslit**
Almenna úrslitið vísir avlop ella hall hjá tí almenna og verður lýst sum munurin millum almennar inntøkur og útreiðslur. Uppgerðin fylgir teimum leiðreglum, sum tjóðarroknskapurin verður uppgjørdur eftir. Tað almenna fevnir um heimastýrisfyrisitingina, kommunufyrisitingina, ríkisfyrisitingina og sosialar grunnar. Verður vanliga nevnt *General Government Overall Balance* ella *faktisk offentlig saldo.*

**Staðfest framleiðsla**
Virðið á vørum og tænastum frá marknaðarligari framleiðslu, framleiðslu til egna nýtslu og aðrari framleiðslu, sum ikki er marknaðarlig. Framleiðsla er ikki tað sama sum søla. Til dømis er framleiðsluvirðið í handilsvirki ikki sølan, men sølan minus innkeyp av handilsvørum (bruttovinningur). Í frágreiðingini verður bruttovirðisøkingin úr tjóðarroknskapinum nýtt sum vísital fyri framleiðslu. Bruttovirðisøking ella bruttotjóðarúrtøka verða sum oftast brúkt sum vísitøl fyri framleiðslu. Verður vanliga nevnt *Actual Output* ella *faktisk produktion*.

**Tað almenna**
Tað almenna fevnir um heimastýrisfyrisitingina, kommunufyrisitingina, ríkisfyrisitingina og sosialar grunnar. Heimastýrisfyrisitingin fevnir um landsstovnar, meðan kommunufyrisitingin fevnir um kommunurnar og kommunustovnar. Ríkisfyrisitingin fevnir um donsku ríkistovnarnar í Føroyum, og sosialu grunnarnir eru Arbeiðsloysisskipanin, Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, Barsilsskipanin og Heilsutrygd.

## Bókmentir

[1] Danmarks Nationalbank. Konjunkturudsving og offentlige finanser. Kvartalsoversigt, 1. kvartal 2011 - Del 1. Ann-Louise Winther, Økonomisk Afdeling. Bls. 71-91. Tøkt á http://www.nationalbanken.dk/C1256BE2005737D3/side/Konjunkturudsving_og_offentlige_finanser!opendocument.

[2] De Økonomiske Råd, Dansk Økonomi Efterår 2013. Tøkt á http://www.dors.dk/sw10885.asp, oktober 2013.

[3] De Økonomiske Råd, Strukturel saldo til Dansk Økonomi, efterår 2012. Tøkt á http://www.dors.dk/sw7987.asp.

[4] European Central Bank. Potential output, economic slack and the link to nominal developments since the start of the crisis. Í ECB Monthly Bulletin, November 2013. Tøkt á http://www.ecb.europa.eu/pub/pdf/mobu/mb201311en.pdf, 2013.

[5] Finansministeriet. Beregning af den strukturelle offentlige saldo. Arbejdspapir nr. 17/2005. Tøkt á http://www.fm.dk/publikationer/arbejdspapirer/2005/arbejdspapir-nr,-d-,-17-2005/~/media/Files/Arbejdspapirer/arbpap1705.ashx, 2005.

[6] Finansministeriet. Budgetoversigt 2, august 2013. Frágreiðing tøk á http://www.fm.dk/publikationer/2013/budgetoversigt-2-aug-13/.

[7] Finansministeriet. Finansministeriets beregning af gab og strukturelle niveauer. Tøkt á http://www.fm.dk/nyheder/pressemeddelelser/2012/11/oversigt-over-oekonomiske-regneprincipper/.

[8] Finansministeriet. Finansredegørelse 2014. Januar 2014. Frágreiðing tøk á http://www.fm.dk/publikationer/2014/finansredegoerelse-2014/.

[9] Grønlands Økonomiske Råd. Økonomisk Råds rapport, 2011. Tøk á http://naalakkersuisut.gl/~/media/Nanoq/Files/Attached%20Files/Finans/DK/Oekonomisk%20raad/100913Oekonomisk_Raads_Rapport_2013_DK%20(1).pdf.

[10] Hagstova Føroya. Tað almenna. Frágreiðing um leiklutin hjá tí almenna í Føroyum. Tøkt á http://www.hagstova.fo/portal/page/portal/HAGSTOVAN/Hagstova_Foroya/tema/TadAlmenna/ta_almenna_2011_0.pdf, 2013.

[11] IMF. Fiscal Monitor. Taxing Times, October 2013. Frágreiðing tøk á http://www.imf.org/external/pubs/ft/fm/2013/02/fmindex.htm, 2013.

[12] OECD. Economics Department Working Paper No. 434, Measuring cyclically-adjusted budget balances for OECD countries, 2005. Tøkt á http://www.oecd-ilibrary.org/docserver/download/5lgpfmjmgp6k.pdf?expires=1383836537&id=id&accname=guest&checksum=4D7141E26B939DD3CE4F64D89EC58033.

[13] OECD. OECD Economic Outlook, Vol. 2008/1, OECD Publishing. Frágreiðing tøk á http://www.oecd-ilibrary.org/economics/oecd-economic-outlook-volume-2008-issue-1_eco_outlook-v2008-1-en, 2008.

[14] Robert Price og T. Dang. Adjusting Fiscal Balances for Asset Price Cycles. OECD Economics Department Working Papers, No. 868, OECD Publishing. Tøkt á http://dx.doi.org/10.1787/5kgc42t3zqkl-en, 2011.

[15] Rådgivende udvalg vedrørende Grønlands Økonomi. Den Økonomiske udvikling i Grønland. Frágreiðing tøk á http://www.stm.dk/publikationer/groenland03/default.htm, 2003.

[16] Økonomi og Indenrigsministeriet. Økonomisk Redegørelse, August 2013. Bls. 155-178. Tøkt á oim.dk/media/510019/%C3%98konomisk%20Redeg%C3%B8relse%20august%202013.pdf.